VIÐMERKINGAR

# Hesum vil Sambandsflokkurin virka fyri

**Nú valstríðið stendur fyri framman vil eg við nøkrum fáum orðum ynskja øllum veljarum eitt gott val og í stuttum greiða frá politikki Sambandsflokksins.**

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*

Vit í Sambandsflokkinum vóna, at okkara politiska stevnuskrá og okkara konstruktiva arbeiði í farna valskeiði fer at endurvinna okkum sessin á fólkatingi, har vit eisini framyvir ætla at arbeiða álitisfult, og við framtíðini í huga.


VAL05

Vit í Sambandsflokkinum ætla okkum ikki at seta spurningar, sum vit kenna svarið á frammanundan, og vit ætla ikki at verða tey, sum rópa harðast. Harafturímóti fer umboð Sambandsfloksins at grundgeva fyri okkara sjónarmiðum, soleiðis at vit fyri hvønn dag menna okkara sterka felagsskap.

Vit kunnu lova, at vit Føroya fólks vegna fara at reka ein politikk, ið leggur stóran dent á at varðveita ein sterkan ríkisfelagsskap, har trúvirði og tað at halda gjørdar avtalur eru í hásæti.

Tað er í hesum døgum av størsta týdningi at okkara rødd verður hoyrd, tí fyri framman standa stórar avbjóðingar. Til hetta fólkatingsvalið fer okkara dagsskrá at snúgva seg um tríggjar fyritreytir fyri einari sunnari menning av Føroyum.

- **Ríkisfelagsskapurin** skal varðveitast og mennast, tí saman standa vit sterkari.
- **Vinnulívið** skal hava betri marknaðaratgongd úti í Evropa, tí hetta gevur arbeiðspláss her heima.
- **Gransking** og nýhugsan skulu raðfestast í fremstu røð, tí hesi skapa framburð og nýggjar vinnumøguleikar.

Sambandsflokkurin fer altíð at verja tína vælferð.

# Ríkisfelagsskapurin og frælsi hjá tí einstaka føroyinginum

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður og valevni til Fólkatingið*

***Sambandsflokkurin vil frælsi og tryggleika fyri hvønn einstakan!***

Oftast verður orðið frælsi tengt at orðinum "suverenitet".

Tíverri má eg siga at "suverenitetur ella fullveldi" hava lítið og einki við veruligt frælsi at gera.

Vit síggja og hoyra hvønn dag um sokallað suveren lond ella fullveldi, har íbúgvarnir í landinum als ikki eru frælsir.

Fyri mær merkir veruligt frælsi tað at tjóðin hevur frælsi.

Hvat er so tjóðin ? -tað eru vit sum her búleikast og virka. Tað eru vit, fólkið — menniskjuni.

Vit skulu m.a. hava **frælsi** til :

- At fáa okkum góða útbúgving
- At seta okkum búgv, og geva okkara familju eitt trygt og gott lív
- At fáa eitt gott starv og møguleikar fyri at arbeiða okkum upp.
- At hava møguleika og karmarnir til at skapa okkara egnu eydnu.


VAL05

Vit skulu eisini hava **tryggleika:**

- Hóast tú kanst vera føddur á lívsins sokallaðu skuggasíðu, so skal dagligdagurin kortini verða tryggur
- Tú skalt kunna vera veikur í samfelagnum og kortini hava eitt trygt gott lív
- Og hóast tú ert eldri, skalt tú kunna hava tryggar karmar og eitt gott og sømiligt lívskvøld.

Uppgávan hjá teimum **fólkavaldu** er áhaldandi at tryggja hvørjum einstøkum av okkum hetta frælsi.

Í Amerika hava fleiri enn hálvthundrað statir tikið seg saman fyri at tryggja sínum borgarum hesar møguleikar og hesi frælsi. Hvør einstakur statur er nógvar ferðir størri enn onnur lond. Hóast tað, so hava statirnir sæð, at uttan at standa saman, kunnu teir ikki tryggja tjóðini veruligt frælsi. Prísurin fyri veruligt frælsi er at lata nakað av avgerðarrætti til Washington

Londini í Evropa hava eisini sæð, - eftir mong krígg og stríð teirra millum,- at veruligt frælsi og veruligir møguleikar fyri tjóðirnar einans kunnu tryggjast við at standa saman.

Úrslitið av hesum er ,at alsamt fleiri av londum hava tikið seg saman í ES.

Prísurin fyri at tryggja borgarunum — tjóðini — frælsi og møguleikar, hevur eisini her verið at londini lata avgerðarrætt frá sær - til Brússel

Í Føroyum er støðan ikki øðrvísi enn í Amerika og restini av Evropa. Fyri at tryggja tjóðini veruligt frælsi, mugu vit hava ein sterkan stat — eitt sterkt sambandsríkið og fyri hetta lata avgerðarrætt í ávísum førum.

Uttan ein sterkan stat kunnu vit ikki tryggja tjóðini veruligt frælsi. Vit tryggja Føroya fólki — tjóðini - frælsi, menning og møguleikar gjøgnum Ríkisfelagsskapin.

Eru vit **ikki** longur í Ríkisfelagsskapinum fáa vit "suverenitet / fullveldi ", men tjóðin missir frælsi og møguleikar.

Hvat er tá vunnið?

Frælsi kann ikki fatast, - uttan í mun til ófrælsi.

Tann ið ikki kennir ófrælsi, - kennir heldur ikki frælsi.

Í dag hava vit í Føroyum stórt sæð einki ófrælsi, ið stendst av stjórnarstøðuni ella sum kann bøtast við at broyta stjórnarstøðuna.

Sambandsflokkurin arbeiðir fyri áhaldandi at hava størst møguligt frælsi og trygd til hvønn ein-stakan av okkum.

Hetta vilja vit eisini millum mong onnur áhugamál , áhaldandi brúka okkara fólkatingssess til at virka fyri.

Við Sambandsumboðan á Fólkatingið eru tygum í góðum tryggum hondum.

Farið tí á val tann 8 . februar og setið kross við Sambandsflokkin ella eitt av valevnum hansara.

Við Sambandskvøðu.

## Gjald fyri valgreinar

Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka gjald fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið, hetta fram til fólkatingsvalið.

Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.

**Sosialurin**

# ...tí tað eru vit, sum vilja hava samband við allan heimin!

**Annita á Fríðriksmørk**
*tingkvinna og valevni Tjóðveldisfloksins.*

Tjóðveldisflokkurin er fyri samstarvi í útnorði, tí tjóðirnar har samstarva á jøvnum føti.


VAL05

Tjóðveldisflokkurin er fyri, at Føroyar fáa limaskap í Norðurlandaráðnum, tí tá fingu vit har eina sjálvstøðuga rødd og vildu soleiðis samstarva á jøvnum føti við hini Norðurlondini.

Somuleiðis eru vit fyri, at Føroyar gerast limaland í Sameindu Tjóða.

Men hví er Tjóðveldisflokkurin so ímóti limaskapi í ES, tá vit ynska limaskap við ST, Norðurlandaráðið og útnorðurráðið?

Í stuttum er at siga, at hendan mótstøðan móti ES, sum allir politisku flokkarnir í Føroyum hava - uttan Sambandsflokkurin - kemst einamest av tí fiskiríkidømi, sum er runt Føroyar, - hvørs ríkidømi vit missa ræði og ávirkan á, um vit gerast limir í ES. Eisini eru vit í heila tikið ímóti limaskapi við felagsskapir, sum ikki tryggja smátjóðum fólkaræðisliga ávirkan og vald á sínum tilfeingi og framtíð.

Men vit halda tað verða umráðandi, at vit fáa limaskap og virka í altjóða felagssakpum, sum hava týdning fyri vinnu okkara, mentan, útbúgving og gransking. Slík stremban vil geva okkum ein nógv størri pall at spjaða virksváðan, og opnar dyr allastaðni úti í heimi og vil soleiðis forka okkum inn í virksemi av alskyns slagi, sum annars ongantíð síggja dagsins ljós í einum afturlatnum heimastýri.

Útnorðurráðið eigur at samstarva miðvíst við ES

Um vit eru ímóti limaskapi í ES so er alneyðugt at vit hava eitt gott samstarv við ES. Hetta samstarv fæst best við, at londini í útnorði standa saman sum ein mótvekt og samstarvsfelagi hjá ES. Samstarvsavtalur av slíkum slag skulu tryggja hesum trimum londunum í útnorði marknaðaratgongd til tann stóra marknaðin niðri í ES. Eisini eiga samstarvsavtalurnar at útbyggja útbúgvingar- og granskingarmøguleikar fyri ungdóm okkara allastaðni í Europa. Hetta er alneyðugt um framtíðartilfeingi okkara — tey ungu og børnini — skulu hava nakran møguleika í framtíðini at lyfta Føroyar á eitt altjóða støði, sum er og verður kravið, um tú skalt fylgja øðrum vesturlendskum tjóðum.

Hetta eigur at verða boðskapar okkara eisini á Fólkatingi nú tey fyrireika at senda alsamt fleiri mál niður til Brússel at umsita. Vit mugu ikki siga sum Sambandsflokkurin, at tey stóru og tungu málsøkini eru betur umsitin í Brússell enn heima hjá okkum. Vit mugu hava høvuðsábyrgdina og mugu finna samstarvsloysnir við onnur lond. Onnur lond kunnu ikki hava høvuðsábyrgdina og gera avtalur fyri okkum. Tað megna vit best sjálvi, tí tað eru vit, sum vilja hava samband við allan heimin!